

## Lena vitjar aftur Atlantis

Leygarkvøldið 13. desember fer Lena Anderssen at hava konsert í Atlantis derssen spældi fyri fullsettum Atlantis í november í fjør verið sera virkin við sínum tónleiki, skrivar Norðlýsið. Seinasta árskiftið endaði við, at fløgan »Let Your Scars Dance« varð vald Ársins Fløga. Fyrst á Planet Awards og seinni góvu lesararnir hjá Dimmalætting fløguni sama heiður. Í ár hevur Lena spælt fitt av konsertum í Føroyum, og í útheiminum hevur verið boð eftir føroysku songkvinnuni á danska Spot festivalinum í Århus og Nordic Music Week í Stavanger, har hon skrivaði og framførdi løg saman við øðrum sangskrivarum úr Norðurlondum og Evropa. Afturat konsertum í summar í Danmark, Belgia og Írlandi fekk Lena tann stóra heiður at syngja fyri Haakuni krúnprinsi úr Noregi, tá hon sum einasta útlendska navn varð boðin við til setanarkonsertina av stóra ONS oljutiltakinum í Noregi í august.

# Bæði veiða og veiðivirði eru minkað

**Sambært tølum hjá Føroya Fiskimannafelag er samlaða veiðinøgdin í tíðarskeiðnum frá januar til september í 2008 lækkað við umleið 14%, samstundis sum samlaða veiðivirðið er lækkað við útvið 23%**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rasmussen & Weihe hava aftur gjørt eina roknskapargreining av fiskiskipaflotanum. Flestu fiskiskip, sum eru omanfyri 110 tons (línuskip og onnur) eru við eins og skip, sum hava eina maskinorku, ið er yvir 400 HK (trolarar). Henda flokking svarar til flokkingina av fiskiskipum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Fyrsta greiningin hjá felagnum av hesum slagi var fyri árið 2003, og í greiningini hesaferð eru samanburðir við undanfarin ár.

Grundarlagið undir greiningini er í fyrsta lagi almennu roknskapirnir hjá teimum feløgum, ið eiga skipini, og harumframt hevur grannskoðarafelagið útvegað sær upplýsingar um nettosølur, veiðinøgd og annað.

Roknskapargreiningin er býtt upp í hesar vinnugreinar 1) Pelagisk vinna, 2) Rækjuvinna, 3) Verksmiðjutrolarar, 4) Partrolarar, 5) Lemmatrolarar, 6) Línuskip, 7) Garnaskip og 8) Onnur skip.

- Vit hava lagt dent á at lýsa gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki hesi fimm árini. Fyri at fáa eina heildarmynd av fiskiskipavinnuni, hava vit eisini lagt tølini fyri allar skipabólkar saman, sigur felagið.

### Egnar niðurstøður

Rasmussen & Weihe siga seg leggja dent á, at roknskapargreiningin skal geva lesarunum møguleika fyri at gera sínar egnu niðurstøður.

- Tilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymiskir hættir. Vit kunnu staðfesta, at stórar broytingar eru farnar fram hjá fiskiskipaflotanum í tíðini frá 2003 til 2007.

Felagið vísir á, at fiskiflotin sum heild hevði eina afturgongd árini frá 2003 til 2004, men henda afturgongd vendi til framgongd aftur í 2005 og 2006.

Í 2006 er framgongdin stór, men í 2007 gongur aftur niður á bakka.

Greiningin hjá Rasmussen & Weihe fevnir ikki um árið 2008, men felagið vísir á, at ábendingar eru um, at árið í ár verður verri enn í 2007 hjá øllum skipabólkunum tilsamans.



*Tað vóru tey bæði, Bjarni Arnason og Jacobina í Lambanum, sum stóðu fyri framløguni hjá Rasmussen & Weihe, um gongdina hjá skipaflotanum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Nøgd og virði

Sambært tølum hjá Føroya Fiskimannafelag er samlaða veiðinøgdin í tíðarskeiðnum frá januar til september í 2008 lækkað við umleið 14% samanborið við somu tíð í 2007.

Rasmussen & Weihe vísa á, at í sama tíðarskeiði er samlaða veiðivirðið sambært hagtølunum eisini lækkað við útvið 23%.



*Polarhav og Stjørnan eru ikki við í greiningini, tí feløgini, sum eiga skipini, eru skipað sum kommanditfeløg*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# 83 fiskiskip við í roknskapargreining

**Talið av fiskiskipum, sum eru við í roknskapargreiningini hesaferð, eru 83 í tali í mun til 91, tá ein slík greining varð løgd fram fyrstu ferð í ár 2003**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært greiningini av fiskiskipaflotanum, sum grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe hava gjørt síðan 2003, er talið av fiskiskipum, sum við eru, minkað við tilsamans átta skipum.

Hetta tal sigur sum so einki og merkir heldur ikki, at hetta er ein ábending um minkandi veiðiorku.

Í 2003 var samlaða talið av skipum 91, í 2004 86, í 2005 85, í 2006 82 og í 2007 er talið so 83 – ella átta færri enn í 2003.

Felagið sigur, at nøkur skip, sum annars høvdu verið við í greiningini, eru ikki við, tí tey antin ikki hava latið inn roknskap – ella eru løgd í 2007.

Ísfiskatrolararnir Polarhav og Stjørnan eru heldur ikki við, tí feløgini, sum eiga tey skipini, eru skipað sum kommanditfeløg.

Eydna, fyrrverandi Vesturvarði, er ikki við, tí eingin roknskapur fyrilá, og síðan er Carlton, sum nú ikki er longur í okkara fiskiskipaflota, heldur ikki við.

Aftrat hesum er Varðborg, ið er seld til gágguveiði, ikki við í greiningini hjá Rasmussen & Weihe.